

# Av Atlantsmóti í Kyrrahavið

Jan Müller

07.07.2015 - 14:05

Oljan.fo

Nútímansgerð og útbygging av Schiehallion oljuleiðini eystan fyri føroyska markið hevur m.a. við sær, at eitt spildurnýtt goymslu- og framleiðsluskip verður bygt. Gamla FPSO skipið, sum hevur tikið ímóti oljuni frá risastóru oljukelduni frá byrjan, er selt til eitt felag í Malaysia. Í mai var heimsins størsta flutningskip, Dockwise Vanguard, eftir skipinum í Rotterdam og hevur siglt tað til Indonesia, har tað er í løtuni.

Flutningskipið lastar 117.000 tons. Oljuskipið vigar 60.000 tons. Bert ein last hevur verið størri, nevniliga oljuskipið Goliat, sum vigaði 64.000 tons og sum herfyri varð flutt úr Korea í Barentshavið, har tað skal taka ímóti fyrstu oljuni í Barentshavinum.

